# Flogbólturin hoyrir til flaggskipini

**Síðani oyggjaleikirnir byrjaðu, hevur flogbólturin altíð verið eitt av sterkastu kortunum hjá Føroyum. Og vónin er sjálvandi, at leikirnir hesa ferð ikki verða nakað undantak**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í tveimum fantastiskum - mest sum ótrúligum - finaludystum fyri tveimum árum síðani, mundu føroysku flogbóltsmenninir og - kvinnurnar mest sum negla alla tjóðina at sjónvarpsskíggjanum heima í Føroyum.

Og hóast talan »bert« gjørdist um gull í kvinnufinaluni, meðan menninir máttu taka til takkar við silvurinum, so skerst ikki burtur, at úrtøkan var so góð, sum nakar kundi vóna.



*Talan var um tvær fantastiska finalur fyri tveimum árum síðani. Kvinnurnar vunnu sína, meðan menninir »doyðu ein vakran deyða«*

### Umbýttir leiklutir

Undan leikunum var nevnliga greitt, at mansliðið framvegis var í eini endurbyggingarfasu, og tí høvdu tey flestu helst sett seg nøgd afturá, um eitt hálvfinalupláss varð rokkið.

Fyrsti dysturin móti Álandi bar tó boð um, at nakað stórt kundi vera í væntu. Og síðani gekk bara beina leið framá. Gotland fekk av at vita í hálvfinaluni, og so var klárt til finalu móti Saaremaa, sum tó gjørdist ein ov stórur biti.

Men finalan var kanska besti dysturin, sum varð leiktur hesar oyggjaleikirnar, og fimta settið varð ikki avgjørt, , fyrr enn ein heppin Saaremaa serva tók í netið og datt yvir um til 18-16.

So var favoritt-leiklutin hjá kvinnunum kanska meira greiður. Og hóast øll vóru greið um, at tað skuldi gerast trupult, so vóru vónirnar í øllum førum til gullið. Men eisini tær noyddust tó út í fimm sett, og eftir at hava tveitt 2-0 leiðslu burtur, mundu nervarnir vera í hásætinum, men tað eydnaðist kortini at vinna seinasta settið og harvið fullgera hat-trickið við trimum gullmerkjum á rað.

Í so máta er leiklutirnir nakað umbýttir hesaferð. Hjá kvinnunum hevur ein hampuliga stór útskifting verið á liðnum, og ikki minst man tað vera ein missur, at super-veteranurin, Marjun Kalsø, ikki longur er partur av liðnum.

At tilfarið er gott, er tó einki at ivast í, men tað kann gerast meira enn møtumikið hjá ungu spælarunum, um talan til dømis verður um enn ein fimmsettara móti Saaremaa í finaluni.

Menninir tykjast hinveg-in vera komnar fram við sínari uppbygginarfasu, og nú skulu fruktirnar av langtíðar arbeiðinum heystast. Tað kann best av øllum gerast við einum finalusigri, og so er tað sum so líkamikið, hvørt mótstøðuliðið í hesum verður Gotland, Áland ella Saaremaa.

### Lúmskt bólkaspæl

Áðrenn vit koma so langt sum til at tosa um hálvfinalu og finaludystir, so skal tó sleppast víðari úr bólkaspælinum. Og tað kann kanska vísa seg sum ein lúmsk uppgáva.

Her standa kvinnurnar seg helst betri, tí sum vinnarar eru tær seedaðar ovast. Og tí inniheldur teirra bólkur dyst móti nummar fýra frá seinastu oyggjaleikum.

Sum tvey'arar skulu menninir aftur hesa ferð royna seg móti Álandi í bólkaspælinum, sum eisini telir Gotland, og hóast hetta er ein trupul uppgáva, so er talan kanska um fyrimun, tá talan somikið tíðliga er um eina so greiða styrkisroynd. Tað ger í øllum førum, at spælararnir skulu upp á tærnar alt fyri eitt, um sleppast skal undan eini alt ov truplari hálvfinalu.

Her tóktist tað seinast vera ein vansi hjá kvinnunum, at talan sum so var um hampuliga avmarkaða mótstøðu í bólkaspælinum. Tað ger kanska, at liðið kemur ov lætt fram til avgerandi dystirnar, og so krevur tað nógv av spælarunum, tá tær brádliga skulu lyfta seg upp á 100%, eftir at tær bara hava levera 90 í eina knappa viku. Júst tann avbjóðingin verður kanska tann allar truplasta, og tá talan er um intensar kappingar, har spælt verður dag um dag, so eru ráðini altso ikki til nakran off-day.

# Gullið er málið

**Kviki sørvingurin, sum fyri tveimum árum síðani fekk landsliðsgjøgnumbrotið, vónar, at tað hesa ferð skal bera til hjá monnunum at taka gullmerkini**

MENNININ
*Jákup Mørk*

- Vit fara so ikki niður fyri at tapa!

Soleiðis var greiða svarið, tá vit stutt undan oyggjaleikafráferðini spurdu Johan Petur á Stongum, hvørt hann roknaði við, at tað hesa ferð skal gerast til gull hjá føroyska mansliðnum í flogbólti.

Bæði tosið og skrivingin hevur undan leikunum snúð seg um, at Føroyar í ár hava kanska besta mansliðið nakran tíð við sær til leikirnar, og hóast Johan Petur ikki leggur serliga nógv í samanberingar, so heldur hann, at tað sær gott út.

- Sjálvur haldi eg í øllum førum, at liðið tykist sterkari í ár, enn tað var seinast, og tá var í øllum førum nær við. Hinvegin vita vit jú ikki, hvussu støðan er hjá hinum liðunum, og tey kunnu væl eisini hava styrkt um sítt útgangsstøði.

### Mugu tendra alt fyri eitt

Johan Petur sigur, at tey hava lagt nógv fyri í fyrireikingunum til leikirnar.

- Eg haldi ikki, at vit nakran tíð hava vant so nógv, sum vit hava gjørt seinastu tíðina. Frá kappingarloki til gallaveitsluna hildu vit frí, men so hava vit verið í gongd síðani. Hvørt vikuskifti og hvørt mikukvøld hevur venjing verið á skránni, og hesar seinastu tvær vikurnar venja vit hvønn dag. Við somikið strævnari skrá, so er eisini neyðugt, at venjingarstøðan er í lagi.

- Hinvegin er tað spell, at vit ikki hava fingið nakra veruliga dystarvenjing. Kappingarnar her heima liggja jú stillar, og sæð burtur frá onkrum dysti móti unglingalandsliðnum, hava vit ongan dyst spælt yvirhøvur. Og heldur ikki undir venjingunum hevur tað borið til, tí tað er ikki fyrr enn seinastu dagarnar, at vit hava verið fullmannaðir til venjingarnar.

### Blokkurin alt at siga

Spurdur, júst hvørjar styrkir føroyska liðið hevur, heldur Johan Petur, at tað einamest er eitt javnt sterkt lið, sum fer avstað.

- Sjálvandi er Rúni týdningarmikil, og hann hevur tikið seg nógv fram, meðan hann hevur spælt í Noreg.

- Men sum heild haldi eg, at okkara størsta styrki er, at vit ongar greiðar veikleikar hava. Mest týðandi er tó, at blokkurin riggar væl. Ger hann tað, so er tað munandi lættari hjá okkum at standa rætt í verjuni, og hon er so aftur grundarlag undir álopinum. So blokkurin er avgjørt tann parturin av spælinum, sum rigga alt fyri eitt. Við Gotlandi og Álandi longu í bólkaspælinum, mugu vit vera tendraðir frá fyrsta settinum, sigur Johan Petur Poulsen at enda.



*Talan var um veruligt gjøgnumbrot, sum Johan Petur fekk á landsliðnum í fjør. Og við ófatuligum uppsamlingum av gólvinum var hann kanska meira enn nakar maðurin, sum helt Føroyum inni í tøttu dystunum*